# Pól Johannus í B68

Pól Johannes Justinussen, sum í ár skifti úr NSÍ til B68 at spæla, heldur fram á Toftum næsta ár. Heimasíðan hjá B68 skrivar, at tað hevur gingið nakað av tíð at fáa alt uppá pláss, tí Pól Jóhannus hevði sáttmála við NSÍ eisini næsta ár og var leigaður til B68. Nú eru partarnir so komnir ásamt at skriva ein sáttmála fyri komandi ár, og Pól Jóhannus er samstundis loystur frá tí sáttmálanum.




# Scolari krevur álopsspælara

Hóast boðini hava verið, at Chelsea ikki ætlar sær at brúka pengar, tá flytingarvindeygað letur upp í januar, so hevur venjarin sína hugsan um hetta. Luiz Felipe Scolari krevur, at Chelsea keypir ein álopsspælarar afturat sum skjótast. - Eg havi brúk fyri einum álopsspælara. Um vit fáa fleiri skaðar afturat, so kann skjótt brúk verða fyri einum álopsspælara, sigur Scolari. Hildið verður, at fíggjarkreppan fer at avmarka møguleikarnar hjá Chelsea at keypa nýggjar spælarar júst nú.



*Leingi fylgdu kollfirðingar væl við, men Tróndur Kragesteen og liðfelagarnir í Neistanum megnaðu tó at greiða sína skyldu leygardagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Neistin-KÍF 33-29 (15-16):

# Neistin greiddi sína skyldu

**Sum væntað fekk Neistin bæði stigini, tá kollfirðingar vitjaðu í høllini á Hálsi leygardagin. Tað var ikki fyrr enn seinasta løtuna, at sigurin varð staðfestur**

HONDBÓLTUR
*Uni Holm Johannesenuni@sosialurin.fo*

Tað var einki óvæntað í, at Neistin fekk bæði stigini leygardagin. KÍF hevur, eins og í fjør, havt tað truppult í hesum kappingarárinum. Stigatalvan gav greiðar ábendingar um, hvar sigurin skuldi fara – og Neistin fekk eisini fult.

Høllin var ikki meira enn hálvfull, tá bláu havnarmenninir seinnapartin leygardagin staðfestu sína støðu í oddanum. Stóru nøvnini hjá Neistanum høvdu leingi trupulleikar av kollfirðingunum, sum stríddust mannliga. Men í seinastu løtu staðfesti breiddin hjá heimaliðnum rættvísa sigurin.

## Misnýttu

Varð hugt at dómaraseðlinum undan dystinum, so skuldi verið vist, at sigurin til Neistan fór at verða tryggur. Finnur Hansson, Áki Mørk, Ingi Olsen, Tróndur Kragesteen og Carl Herup Olsen eru allir føroyskir landsliðsleikarar, meðan danski David Edvardsen og serbiski Jugoslav Djumic longu hava staðfest seg sum ein av føroya bestu á sínum plássum. Men tað løgdu kollfirðingar líka í.

Liðini fylgdust allan vegin, og tá brikslað var til hvílidna var KÍF á odda við einum máli – 16-15.

Heimaliðið hevði torført í fyrra umfarinum at gera sær dælt av uppløgdum støðum. Fleiri møguleikar vóru misnýttir, og tað gagnnýttu gestirnir við skjótálopum.

Hóast bæði málverjarnir – Óla Kristian Djurhuus úr KÍF og Magnus Matras úr Neistanum – stóðu væl, so var verjuspælið ikki serliga sannførandi. 31 mál eftir hálvum tíma siga alt.

## Breiddin sigraði

Leikgongdin var him sama eftir hvíldina. Neistin legði bragdliga fyri, og vann sær skjótt eina leiðslu á tvey mál, sum teir varðveittu leingi. Tað tóktist sum, at tá heimaliðið setti ferð á bóltin, høvdu kollfirðingarnir trupult at fylgja við. Serliga var vongurin í høgru, Carl Herup Olsen, stórspælandi í seinna hálvleiki. Saman við Áka Mørk tók hann av álvara ábyrgd, og við sínum 10 málum var hann besti málskjútti hjá Neistanum. Hann var ósvikaliga tryggur, tá hann slapp leysur móti Óla Kristiani Djurhuus.

Seinastu løtuna dróg heimaliðið av álvara frá gestunum. Tað skyldaðist mest, at orkan hjá kollfirðingum gekk undan, meðan Neistin allatíðina hevði gott fólk at seta inn. Fyrstu 50 minuttirnar var munurin annars ikki stórur, men so loysnaði. Tá avtornaði vann heimaliðið við fýra málum, 33-29.

Hóast liðini eru í hvør sínum enda á stigatalvuni, so sást tað ikki aftur. Styrkin hjá Neistanum liggur heilt vist í breiddini, hóast teir – sæð eftir nøvnunum – eiga at avgerða dystirnar áðrenn. Men stigini eru tey mest týdningarmiklu, og framvegis er høvuðsstaðarfelagið við í oddanum. Og tað skulu teir eiga rós fyri.

KÍF liggur í tungum sjógvi. Aftur í ár eru teir í botnstríðnum, og tað er einki sum bendir á, at tað verður øðrvísi. Men nógv ungt og dugnaligt fólk er í felagnum, sum borgar fyri góðari framtíð.

## FAKTA um dystin

**Neistin-KÍF 33-29 (15-16)**
**10 min:** 4-5
**20 min:** 8-8
**40 min:** 22-20
**50 min:** 27-25
**Málskjúttar**
**Neistin:** Karl Herup Olsen 10, Áki Mørk 7(2), Jugoslav Djumic 5, Tróndur Kragesteen 5, Finnur Hansson 2, Blagoje Buha 1
**KÍF:** Damir Oros 6(1), Arnbjørn T. Hansen 6, Rógvi Weihe 4, Jákup Trygvason 3, Tony Weihe 2, Andrieas Nielsen 1, Regin Petersen 1
**Brotskøst:** Neistin 3, KÍF 1
**Útvísingar:** Neistin 3, KÍF 2
**Diskvalifikatión:** Neistn 1 (beinleiðis reytt)

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 8 | 7 | - | 0 | - | 1 | 224 | 173 | 51 | 14 |
| 2 Stjørnan | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 188 | 143 | 45 | 11 |
| 3 Tjaldur | 8 | 4 | - | 2 | - | 2 | 211 | 183 | 28 | 10 |
| 4 Neistin | 8 | 3 | - | 3 | - | 2 | 204 | 185 | 19 | 9 |
| 5 StÍF | 7 | 1 | - | 0 | - | 6 | 159 | 213 | -54 | 2 |
| 6 Kyndil | 8 | 0 | - | 0 | - | 8 | 137 | 226 | -89 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 7 | 6 | - | 0 | - | 1 | 192 | 171 | 21 | 12 |
| 2 H71 | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 184 | 159 | 25 | 10 |
| 3 Neistin | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 215 | 200 | 15 | 10 |
| 4 StÍF | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 165 | 166 | -1 | 7 |
| 5 KÍF | 7 | 1 | - | 0 | - | 6 | 165 | 191 | -26 | 2 |
| 6 Kyndil | 7 | 0 | - | 1 | - | 6 | 164 | 198 | -34 | 1 |

